# Forkunnug tónleikaravitjan í Klaksvík

Í sambandi við at Klaksvíkar kommuna fyllir 100 ár í 2008 fær Klaksvík áhugaverda vitjan úr vinarbýnum Norrkøping.

Talan er um Olle Nilsson, sum er ein rættiliga tungur drongur í tónleikaheiminum i Svøríki. Hann hevur spælt seg kenda í fleiri bólkum, men serliga við bólkinum Liverpool, sum einamest spælir Beatlesløg

Olle gørdist enn einaferð landskendur í Svøríki við at vinna í sjónvarpskappingini: Móti stjørnunum - her fyri. Har spældi hann"imagine" hjá John Lennon; sum hann so vann við.

Hesin áhugaverdi tónleikarin, ið til sínar framførslur klæðir seg sum John Lennon og ikki er honum ólíkur, kemur at spæla á almennari framløgu um Norrkøping í býráðshøllini í Klaksvík hóskvøldið 3. apríl kl. 19.30.

Eisini verður hann at hitta á Dávavirkinum seinni um kvøldið – kl. 21.30 og frameftir, har hann fer at greiða frá virki sínum sum tónleikari, og at sita og jamma saman við øðrum røskum klaksvíkingum, verður sagt í tíðindaskrivi frá mentanardeildini hjá Klaksvíkar býráð.



*Olle Nilsson uttast til vinstru saman við bólkinum Liverpool*

# Konsert í Vestmanna

Hóskvøldið 3. apríl skipar ungdómshúsið STAÐIÐ í Vestmanna fyri forvitnuslig ari útgávukonsert við unga og evnaríka guitarleikarnu m Benjamin Petersen, sum er uppvaksin í Vestmanna.

Saman við honum vera kend nøvn innan føroyskan tónleik m.a Eivør Pálsdóttir, Brandur Jacobsen, Gunnar Guttesen og Edvard N. Debes.

Fyrireikararnir siga, at ung sum gomul eru vælkomin oman á STAÐIÐ at síggja og hoyra góðan tónleik saman við bestu tónleikarunum í Føroyum, konsertin byrjar Kl 20.00



*Benjamin Petersen*

# Hoyvíkshagin Suður eitur nú Hoyvíkshædd



Á aðalfundi hjá eigarafelagnum Hoyvíkshagin Suður varð samtykt at broyta navnið til Hoyvíkshædd.

Økið ovast í Hoyvk, har nýggjasta útstykkingin fyri nærum trimum árum síðan var liðug, hevur verið kallað Hoyvkshagin Suður. Upprunaligt var hetta eitt tekniskt navn, sum komst av at hettar var sunnasti partur av tí, sum enn var hagi i Hoyvík.

Ongin hevur verið serliga glaður fyri navnið, og longi hevur verið tosað um at finna betri hóskandi navn.

Á aðalfundi hjá eigarafelagnum, var uppskot um nýtt navn lagt fram. Eftir áeitan frá nevndini kom Hanus Vang, fyrrverandi bóndi í Hoyvík, við uppskoti um at nýggja navnið skuldi vera Hoyvíkshædd.

Navnið var væl móttikið, og við atkvuøðugreislu var navnið samtykt við sera stórum meiriluta. Økið liggur ovarlaga í Hoyvk, og liggur uppi á eini hampuliga flatari hædd.

Formaður í Eigarafelagnum Hoyvkshædd er Andreas Mouritsen.

## Dagurin

1. apríl. Hugo, deyður í 1132. Biskupur í Grenoble í Fraklandi. Týskt navn, sum merkir tann skilagóði ella vísi.

†

Kunngjørt verður fyri ætt vinum og kenningum, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Brynhild Johannessen**

ættað úr Nólsoy
búsitandi í Tórshavn,

andaðist á Lágargarði fríggjadagin 28. mars
87 ára gomul.
Bønarhald verður á Lágargarði mánadagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni týsdagin kl.13.00.

*Familjunnar vegna*
**Niels Símun og Álvhild**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri

**Mads Kristoffer Poulsen**

andaðist á Røktarheiminum Áargarði,
fríggjadagin 28. mars.
Jarðarferðin verður úr Skopunar kirkju,
týsdagin 1. apríl kl. 14.

*Familjunnar vegna*
**Siborg, Jens, Petur, Hans, Connie, Brynhild, Anna Sofía og Ingrid**

Tey, ið vilja minnast Kristoffer, kunnu lata Skopunar kirkju eina penningagávu, konto í Føroya Banka.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæra systir, mostir, fastir, ommu- og abbadidd

**Marjun Heimá**

Tórshavn

andaðist 29. mars 2008, 88 ára gomul.
Bønarhald verður á Lágargarði týskvøldið
1. apríl 2008 kl. 18.00 og jarðarferðin verður úr
Kirkjugarðskapellinum mikudagin 2. apríl 2008 kl. 14.00

**Systkini við familjum**

Tey, ið vilja minnast Marjuna, kunnu lata Zarepta eina gávu. Konta í peningastovnunum.